Grampian Frontier á Havnini:

# Ongin oljudropi í havið í seks ár

OLJUFRAMLEIÐSLAN
Jan Müller



*Sera framkomna oljuskipið Grampian Frontier var á Havnini í vikuni fyri at skifta manning og bunkra*
*Mynd Jan Müller*

- Eg havi verið á varðhaldi við Foinaven oljufeltið í meira enn trý ár og mær vitandi er eingin oljudropi farin í havi øll tey seks árini olja hevur verið framleidd her við føroyska markið sigur ein blíður og professionellur Andy Waring, sum er skipari umborð á tí sera framkomna oljuvaktar- og bjargingarskipinum Grampian Frontier. Skipið kom á Havnina í vikuni fyri at skifta manning og bunkra. Teir eru her eina ferð um árið og brúka annars Lervíkina sum havn. Teinurin av feltinum til Havnar er júst tann sama sum til Lervíkina, umleið 10 tímar.

Andy Waring er sera fegin um skipið, Ið hevur roynst ómetaliga væl, síðani tað varð bygt fyri umleið 5 árum síðani. Tá var framsýningartúrur í Føroyum. Hann letur væl at móttøkuni her og heldur fólkið vera sera fyrikomandi og "relaxed", sum hann tekur til.

- Eg veit væl, at tit føroyingar eisini leita eftir olju, og at tit leggja stóran dent á bæði trygd og umhvørvi. Hetta skipið er fyrsta floks tá tað snýr seg um trygd á einum oljufelti og somuleiðis til tess at kunna varðveita eitt reint umhvørvi. Tað eg veit um er ikki ein dropi av olju likin í havið, hóast tvey tangaskip uppá skift taka olju frá framleiðsluskipinum eina ferð um samdøgrið og flyta hana til oljuterminalin Flotta í Orknoyggjunum.

Foinaven feltið fór undir framleiðslu í mars 1997 sum tað fyrsta nakrantíð á Atlantsmótinum. Tað hevur gingið nógv betri enn væntað og verður 130.000 tunnur framleiddar um dagin. Hitt oljufeltið, Schiehallion, sum liggur nærhendis, er tó væl størri og framleiðir 150.000 tunnur um samdøgrið.

Grampian Frontier, sum fór av Havnini aftur í gjár eftir at hava skift manning, 12 mans, sum komu og fóru við leiguflogfari, er eitt sokallað "Multipurpose" skip, tvs. at tað røkir eina rúgvu av uppgávum kring oljufeltið eitt nú ansa eftir øðrum skipum, er tilreiðar at taka ímóti skaddum fólki frá framleiðsluskipinum og kann átaka sær eina rúgvu av uppgávum á feltinum. Eitt nú hevur tað framkomna útgerð til at gera upptøkur á havbotninum og í hesum sambandi verður fylgt væl við møguligari dálking. Teir fylgja so eisini lívinum í sjónum og latea upplýsingar víðari til avvarandi stovnar.

Andy Waring, skipari er annars ovfarin av, hvussu væl skipið hevur roynst eins og stóra oljuskipið har á leiðini. Hóast talan er um sera veðurbart øki, so hava tey staðið royndina. Men tað er mangan sera ótespiligt og hevur serstakliga ein aldu uppá umleið 30 metrar fest seg í minni hansara. – Eg tók mynd av henni og vísir hon, hvussu risastórar aldurnar kunnu vera her umleiðir. Men hvørki tá ella aðra tíð er nakar skaði hendur.

Tað er Faromar við Johan Dahl, sum tekur sær av Grampian Frontier, tá tað er í Føroyum. Felagið umboðar Georg Craig fyritøkuna, sum hevur leigað skipið til BP í 10 ár.



*Johan Dahl, umboðsmaður vitjar skiparan á brúnni á Grampian Frontier, Andy Waring*
*Mynd Jan Müller*



*Myndin sum skiparin Andy Waring, tók av umlei- 30 metrar høgari aldu á Atlantsmótinum*




*Teir hava eisini góða útgerð til at avmynda fisk og djór. Her er mynd av einum risastórum "Monkfish".*



Starvsfólk í dagstovninum við Gøtugjógv:

# Rakt av herviligari mateitran

**Gøtugjógv:**
Í januar vórðu 8 starvsfólk í dagstovninum við Gøtugjógv rakt av herviligari mateitran. Tað var ikki hissini umgangur, hesar kvinnur fingu. Sjúkan vardi í einar 8 dagar, og hesar dagarnar misti onkur heili 7 kg. ella næstan eitt kilo um dagin. Fepurin var eisini nógvur; onkur kvinna hevði yvir 40 stig, tá ið fepurin var mestur. Tað gekk av báðum endum, og fólk vóru ógvuliga illa til passar.

Tórgerð Hansen, leiðari á dagstovninum, sigur, at kvinnurnar løgdust sjúkar, 8. januar vóru ikki til arbeiðis aftur fyrr enn, 20. januar.

- Tann nógvi fepurin og búkilskan vardi í fyrsta lagi einar 2-3 dagar, men eftir tað vóru tær rættiliga ússaligar, og tað tók langa tíð hjá teimum at koma fyri seg aftur, sigur hon.



*Í januar løgdust 8 kvinnur, sum starvast á dagstovninum við Gøtugjógv, við herviligari búkilsku og fepuri, men ikki hevur borið til endaliga at staðfesta, hvør orsøkin var til sjúkuna.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Skrúvusalat

Kvøldið fyri, at kvinnurnar á hesi eini stovuni løgdust sjúkar, høvdu tær havt fund.

- Tær høvdu gjørt sær ein heitan rætt við skrúvum, skinku, egg, osti og kryddaríum – skrúvusalat, sum tað verður rópt. Tvær vaskikonur, sum vaskaðu á stovninum hetta kvøldið, fingu eisini ein bita av heitu salatini, tá ið tær duttu fram við.

Tórgerð sigur, at tær, sum løgdust sjúkar, vóru 5 kvinnur, ið starvast á teirri stovuni, sum hevði fund hetta kvøldið, eitt starvsfólk á eini aðrari stovu og so hesar báðar vaskikonurnar.

- Tilfarið til skrúvusalatina varð keypt til endamálið, og salatin varð etin so skjótt, hon kom úr ovninum. Vit hava kannað eftir og fingið staðfest, at eingin vøra, sum var í salatini, var útgingin, sigur leiðarin á dagstovninum.

## Málið kannað

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur roynt at kannað, hvør orsøkin kann hava verið til, at hesar kvinnurnar gjørdust so sjúkar og ússaligar og sum skilst, hevur stovnurin fingið matrestir av tí, ið etið varð. Starvsstovan søkti sær hjálp úr Danmark til hesar kanningar.

Long tíð hevur gingið uttan, at nakað veruligt úrslit hevur fyriligið, men virkandi læknin í Gøtu, Gunnar Beckman, sigur, at tey kanningarúrslit, hann hevur sæð, benda ikki á, at talan hevur verið um salmonellaeitran.

Vit spurdu eisini Andreas Petersen, lækna, sum í løtuni er á tingi.

Hann gjørdi sær tann ómak at ringja til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna soseint sum fyrrapartin í gjár. Haðani fekk hann at vita, at ongar bakteriur vórðu staðfestar í teirra kanningum.

- Men eg havi skilt, at tað vóru meira íløtini, sum maturin hevði verið í, sum vórðu kannaði, enn maturin sjálvur. Mítt boð er, at kvinnurnar hava verið raktar av tí bakteriuni, clostridier, sum gevur búkilsku við fepuri.

AndreasPetersen sigur, at bakterian vanliga gongur yvir av sær sjálvari og elvir ikki til varandi mein.

Báðir læknarnir eru samdir um, at kvinnurnar á dagstovninum við Gøtugjógv hava verið ógvuliga óhepnar, men soleiðis kann tað ganga, tá ið illa vil til.

## Starvsnæmingar

Tórgerð Hansen vísir á, at tey vóru í teirri hepnu støðu, tá ið tey 8 starvsfólkini løgdust sjúk, at tríggir skúlanæmingar júst tá vóru á stovninum í starvsvenjing.

- Hesir næmingar vóru okkum til stóra hjálp hesar dagarnar, sigur hon.

Tórgerð sigur, at endamálið við kanningini, sum tey settu í verk eftir mateitranina, fyrst og fremst var at staðfesta, hví fólkini gjørdust sjúk.

- Hevði hetta so samstundis gjørt, at onnur verða spard fyri tílíkari eitran, hevði nógv verið vunnið, leggur hon aftrat.

Tórgerð Hansen heldur ikki, at reinføri í samband við sjálva matgerðina hetta kvøldið hevur nakað við eitranina at gera, tí her var einki at seta fingurin á.

- Handilin, sum seldi vøruna til salatina, tók vørurnar av hillunum, tá ið tey frættu, hvussu vorðið var, sigur Tórgerð Hansen.

# Trailari út av við 17 tonsum av fiski

**- Óvist er, hvat hendi. Bilførarin skilir einki, men heldur, at vegjaðarin kann hava svikið, sigur Heini á Borg, farmaflutningsleiðari hjá Strandferðsluni**

ÓHAPP
*Orð: Vilmund Jacobsen*
*Myndir: Leivur Nygaard*

Seinnapartin týsdagin fór ein 6,5 metra langur trailari hjá Strandferðsluni niðan av vegnum í vegabuginum sunnanfyri gistingarhúsið í Øravík - og koppaði við 17 tonsum av upsa í lastini.

Trailarin, sum var komin um Suðuroyarfjørð við Smyrli, var á veg av Drelnesi suður til Vágs við lastini, sum Palm Seafood í Vági átti. Hetta var fiskur, sum felagið hevði keypt frá skipunum hjá P/F Beta í Saltangará.

17 tons av fiski er ein stór nøgd, tá ið slíkt hendir, og ein partur av fiskakassunum brutu seg út ígjøgnum flasfipurveggirnar og endaðu við síðuna av trailaranum.

So, hetta sá heldur enn ikki ógvusligt út.

## Ikki avleiðingar

Heini á Borg, farmaflutningsleiðari hjá Strandferðsluni, sigur, at førarin, sum er úr Hvalba, slapp eftir umstøðunum væl frá hendingini. Hann endaði hjá læknanum á Tvøroyri, har hann fekk tríggjar pentur í andlitið.

- Bilførarin, sum hevur koyrt nógvar túrar fyri okkum og er royndur á økinum, hevur tað gott.

Spurdur, um hendingin fær avleiðingar fyri føraran, sigur Heini, at tað fær hon ikki.

Trailarin er illa farin, men tá ið vit frættu fyri døgurða í gjár, var ikki greitt, um hann verður umvældur.

Heini á Borg heldur ikki, at hendingin fer at hava útreiðslur við sær fyri Strandferðsluna, tí bæði trailari og lastin eru tryggjað.

## Til Havnar

Týskvøldið fekk Palm Seafood fiskin, og har verður hugt at, hvussu stórt svinnið verður, nú hesin fiskurin fekk so harða viðferð.

Tveir kranabilar fingu trailaran uppaftur eftir, at lastin fyrst var tømd fyri fisk. Tað vóru fólk hjá tryggingini og strandferðsluni, sum tóku sær av at tøma bilin, savna fiskin saman og fingu hann til Vágs við øðrum akførum hjá stovninum.

Trailarin, sum fór niðan av vegnum, kom til Havnar við Smyrli í gjár.



